# Kjak

## Ongantíð áður hava so nógv fingið eitt útbúgvingar-tilboð i Føroyum



**Helena Dam á Neystabø**
*landsstýriskvinna í mentamálum*

*Tað er ikki eiti á, sum Tjóðveldið leikar í, nú ið nýggja lestrarárið stendur fyri framman, og tað verður ein veruleiki, at so nógv ung sum ongantíð áður fara undir eina útbúgving í Føroyum*

Eg haldi ikki tað klæðir tjóðveldinum at lata so illa at, tá ið vit í veruleikanum tosa um eina sólskinssøgu. Tí hóast fíggjarstøðan á mínum og á øllum øðrum málsøkjum er sera trong, so verða tað samanlagt yvir 500 fleiri lesandi á vinnu- og miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum í nýggja lestrarárinum.

Her hava veruliga øll lagt nógv fyri, til tess at gera Føroyar til eitt gott lestrarland. Og eg vænti, at tað fer at eydnast.

### Øll á biðilistanum sleppa inn

Í gjár fekk Mentamálaráðið kunning frá Fróðskaparsetrinum um, hvussu mong hava tikið av einum lestrartilboð. Niðurstøðan eftir hetta er, at øll tey, sum í dag standa á biðilista til lærara- og námsfrøðing, fáa tilboð um at byrja hesar útbúgvingar eftir summarfrítíðina. Tá hava tilsamans uml. 220 fingið eitt tilboð um hægri lestur í 2010. Tað er met í føroyskari útbúgvingarsøgu.

Eisini á vinnu- og miðnámsskúlum okkara er tilgongdin so stór sum ongantíð áður. Tá ið skúlarnir byrja aftur í næstu viku, byrja fleiri enn 1200 nýggir næmingar upp á eina miðnámsútbúgving. Ein vanligur ungdómsárgangur telur uml. 700, so her er veruliga talan um risastóran áhuga.

Samgongan hevur sett sær fyri, at øllum skikkaðum miðnámsumøkjarum skal standa í boði at sleppa í skúla. Eisini hetta sær út til at eydnast - í tann mun at pláss er á skúlunum.

### Skyldu at tryggja, at játtan er tøk

Sum landsstýriskvinna havi eg mótvegis løgtinginum skyldu at tryggja, at eisini fígging er til so nógv økt virksemi í ár og ikki minst næsta ár, og var tað grundgevingin fyri, at neyðugt var at hava ein eitt sindur longri bíðilista til lærara- og pedagogútbúgvingina í døgunum frá 15. juli og fram til í dag. Hetta gjørdi eg fyri at tryggja mær, at vit ikki koma í somu støðu sum í 2009, tá ið nógv virksemi ikki kundi fara í gongd, orsakað av, at ov rívan var tikið til í 2008.

Somuleiðis havi eg skyldu at tryggja, at nóg stór játtan er sett av til lestrarstuðul. Men tað er ómetaliga trupult at meta neyvt um, hvussu stórur tørvurin er á lestrarstuðli, tá ið so óvanliga nógv vilja sleppa at útbúgva seg. Og kanska verður tað neyðugt at fremja onkrar tillagingar afturat.

Høgni Hoydal tosar í lesarabrævi í dag um, at tað er kleyvarskapur frá landsstýriskvinnuni ikki at hava mett rætt um tørvin á lestrarstudningi. Tað kann vera, men veruleikin er, at eg í summar bað løgtingið um eina eykajáttan til lestrarstuðulin upp á 6 milliónir – júst tí at vit vistu, at nógv fleiri fóru at lesa á Fróðskaparsetrinum eftir summarfrítíðina. Men fíggjarnevndin lækkaði hesa umbøn til fimm milliónir, so vítt eg veit við stuðli frá báðum umboðum tjóðveldisfloksins í fíggjarnevndini. So vit eru kanska fleiri um kleyvarskapin.

Men tað skal ikki skilja okkum. Lat okkum í felag fegnast um, at Føroyar nú av álvara kann metast sum eitt lestrarland. Og at vit gera ta bestu íløguna í ungdómin, sum hugsast kann – nevniliga at tryggja teimum eina útbúgving.

# Nøvn

## Suni Jacobsen 80 år

**15. august 2010**



I år det er et jubelår
For du Suni Jacobsen fyller 80 år
Du bærer alderen som en prins
Og minner mer om en ung hingst
Du liker å gå tur i fjellet
Og følger med på det aktuelle

Du tåler mye mas og ståk
Og er veldig god i språk
Å skrive dikt og sang går lett
Men gjør det helst om du blir bedt
Lenge har du vært god å male
Færøysk natur er ditt spesiale

Du liker det kulturelle
Og har gode historier å fortelle
Er med på det sosiale som skjer
Og evner å bruke et klaver
Du er dyktig til barnepass
Når vi spør om det er du raskt på plass

Ta vare på dine talenter
Ja, vi mye mer av deg forventer
Vi takker for at du er til
Og at du er så flott og snill
Vi vil med dette deg gratulere
Og til slutt for deg applaudere

Alt godt for dagen og framtiden fra din svigerdatter, sønn og barnebarn i Norge

# Føðingar

31. juli fingu Theresa Joensen og Steinar Strøm Sævarsson, Vági, ein son. Hann var 52 cm og vigaði 3500 gr.

2. august fingu Súsanna Guðrið Dam og Ólafur Debes Arnfriðsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm lang og vigaði 3465 gr.

3. august fingu Joan Niclasen og Áki Ellendersen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 53 cm lang og vigaði 3175.

5. august fingu Vár Róin og Sigfrid Petersen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 41 cm lang og vigaði 1260 gr.

6. august fingu Barbara Sjúrðardóttir Nordbúð og Don Eyðbjarnaarson Joensen, Skála, eina dóttir. Hon var 55 cm lang og vigaði 4365 gr.

6. august fingu Mary-Ann Anthoniussen og Wilhelm Petersen, Húsavík, eina dóttir. Hon var 54 cm lang og vigaði 4290 gr.

6. august fingu Katrin Sørensen, Hoyvík og Róald Johannesen, Dalur, eina dóttir. Hon var 52 cm lang og vigaði 3600 gr.

7. august fingu Erla og Áki Mortensen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm og vigaði 5055 gr.

9. august fingu Beinta Ejesegaard og Magnus Dam, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 54 cm lang og vigaði 3700 g.

10. august fingu Ann-Britt T. Johannesen og Dánjal J. Magnussen, Oyrabakki, ein son. Hann var 56 cm og vigaði 4610 gr.

10. august fingu Gunnvá Árnadóttir Lervig, Leirvík og Tórur Didrik Djurhuus, Saltangará, eina dóttir. Hon var 55 cm og vigaði 4170 gr.

12. august fingu Laila og Jóan Petur Hentze, Hoyvík, ein son. Hann var 52 cm og vigaði 3900 gr.